# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*– Tað krevur nógva tíð og orku at venja eitt lið í bestu deildini, og eg haldi ikki, at eg eri klárur til at verða venjari hjá einum liði í Formuladeildini.*

*Rúni Nolsøe, fyrrverandi AB-venjari*



*Rúni Nolsøe var spælandi venjari hjá AB, sum flutti úr 1. deild og upp í Formuladeildina, men hann heldur ikki fram sum venjari í felagnum*

# Rúni Nolsøe gevst sum venjari í AB

**- Eg haldi ikki, at eg eri klárur at verða venjari hjá einum liði í Formuladeildini, sigur Rúni Nolsøe, sum gevst sum venjari hjá AB. Argjamenn missa eisini liðformannin og toppskjúttan**

**FÓTBÓLTUR**
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Rúni Nolsøe hevur í ár staðið á odda fyri AB-liðnum, sum vann seg úr 1. deild og upp í Formuladeildina, men tað verður ikki Rúni, sum fer at venja liðið næsta kappingarár.

- Eg havi hugsað um støðuna, og nú AB vildi hava eitt svar frá mær, havi eg sagt teimum, at eg haldi ikki fram sum venjari hjá teimum, sigur Rúni Nolsøe.

- Tað krevur nógva tíð og orku at venja eitt lið í bestu deildini, og eg haldi ikki, at eg eri klárur til at verða venjari hjá einum liði í Formuladeildini. Ætlanin var, at eg skulu trappa eitt sindur niður frá fótbóltinum, tá ið eg gavst at spæla í HB, men tað havi ikki rættiliga kunnað seinasta árið, sigur hann.

### Stuðulsspælarar burtur

Rúni hevur ikki gjørt av, hvat hann ætlar sær við fótbóltinum næsta ár.

- Eg taki tað heilt róliga beint nú, og so fáa vit at síggja, hvussu tað verður næsta ár. Okkurt verður helst, tí eg havi framvegis hug at verða við í fótbóltinum, men eg veit ikki rættiliga, hvat tað verður, sigur hann.

AB er nú farið at leita eftir nýggjum venjara til næsta kappingarár, og liðið skal eisini hava nýggjan liðformann, tí Allan Mørkøre skiftir til B36 næsta kappingarár. Allan spældi í ár í álopinum hjá AB, og hann var toppskjútti.

## Klæmint gjørt avtalu við B36

Liðformaðurin hjá B36, Klæmint Matras, heldur fram í felagnum næsta kappingarár. Klæmint og B36 hava júst gjørt nýggja avtalu fyri næsta ár, og í B36 fegnast tey um, at drúgvi verjuspælarin heldur fram.

- Klæmint er avgjørt ein av teimum spælarunum, sum hoyrir til grundstuðlarnar á liðnum. Og tí eru vit fegin um, at hann hevur valt at leingja sáttmálan. Spurningurin var, um hann eitt skifti varð noyddur at flyta til Danmarkar, men tann spurningurin er nú loystur, so hann spælir eisini í B36 í 2007 sigur Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn.

## Holst vil halda fram í Lyngby

Christian Lamhauge Holst hevur staðið seg væl á liðnum hjá Lyngby, sum liggur í toppinum í donsku 1. deild. Hendan støðan er millum annað orsaka av málunum, sum Holst hevur skotið fyri liðið. Síðsta vikuskiftið skoraði Holst bæði málini, tá ið liðið vann á Fremad Amager. Holst, sum hevur spælt tveir landsdystir fyri Føroyar, ætlar sær at halda fram í Lyngby, hóast sáttmálin við felagið gongur út við árslok.

- Eg vóni, at vit kunnu semjast um ein nýggjan sáttmála, tí eg vil allarhelst halda fram í Lyngby, sigur Holst við heimasíðuna hjá felagnum.

## Chelsea vann stórdystin

Í gjárkvøldið spældu Chelsea og Bracelona í Champions League, og tað gjørdist enska felagið, sum vann stórdystin í London. Eitt mál kom í dystinum, og tað gjørdi Didier Drogba beint eftir hálvleikssteðgin.

- Chelsea hevði uppiborið at vinna. Chelsea hevur eitt framúr gott lið, og tað er trupult at spæla ímóti teimum, tá ið teir koma á odda, segði Barcelona-venjarin, Frank Rijkaard, eftir dystin.

# Mjølnir fekk fyrsta sigur

**Mjølnir fekk sín fyrsta sigur í meistaradeildini hjá monnum, tá teir vunnu í Sørvági í gjár.**

**FLOGBÓLTUR**
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Ein dystur í meistaradeildini hjá monnum var á skránni í gjár, tá SÍ tók ímóti Mjølnir. Bæði liðini høvdu tapt teirra fyrsta dyst, og tí hevði tað stóran týdning fyr báðar partar at vinna dystin í Sørvági í gjár.

### SÍ betri frá byrjan

SÍ fekk betru byrjanina í dystinum. Fyrsta settið gjørdist sera spennandi, og liðini fylgdust allan vegin uppá 27-27. SÍ hevði tó havt munin, og Mjølnir hevði ongan settbólt havt hetta settið. Dysturin endaði eisini við sigri til sørvingar, sum vunnu 29-27.

Í øðrum settið kom SÍ ongantíð ordiliga fyri seg, og Mjølnir vann hetta settið trygt, 16-25. Í triðja settið var aftur vent í holuni, tí aftur hesaferð hevði SÍ munin. Teir førdu næstan alt settið og vunnu at enda 25-21.

Nú stóð illa til hjá Mjølnir, sum seinasta vikuskiftið vann sær sætið í steypafinaluni, tá teir vunnu FK-kappingina í Havn. Teir vóru týðiliga skakaðir av ágangandi sørvingunum, og teir høvdu serliga ringt at leika seg framvið vælleikandi verjuni hjá SÍ, sum ferð aftaná ferð bjargaði góðum smashum frá Mjølnir álopinum.

### Mjølnir royndist betur

Eftir triðja sett var týðiligt, at leikararnir hjá Mjølnir høvdu sæð, hvønn veg tað ber. Teir tóku seg veruliga saman, og eftir hetta var ongantíð nakar ivi, hvat var betra liðið. Mjølnir vann aftur fjórða settið, 16-25. Tað sást á øllum brøgdum, at Mjølnir hevði størri bit í álopspartinum, og nógv bendi á, at sigurin fór at enda í Klaksvík.

Fimta settið hevði júst somu gongd sum fjórða. Mjølnir streyk avstað, og eisini hetta settið vunnu teir trygt. Úrslitið var 8-15, og sostatt hevði Mjølnir fingið sín fyrsta sigur í ár.

Nú er Mjølnir komið í gongd, og teir fara heilt víst at leika við um medaljurnar í ár. Hjá SÍ sær minni gott út. Teir eru heilt góðir í verjupartinum, men í álopspartinum haltar. Um teir skulu gera sær vónir um medaljur, so skulu teir skjótt hava nøkur stig á talvuna.